Fuglafjarðar Kommuna

# Starv sum bókavørður á Fuglafjarðar bókasavni

Starvið sum bókavørður á Fuglafjarðar Bókasavni verður hervið lýst leyst til setan tann 01. mars 2011 ella skjótast eftir hetta.

**Starvið:**
Tú kemur í starvinum at hava leiðsluna av Bókasavninum, har tú kemur at arbeiða við øllum vanligum bókavarðaarbeiði í tøttum samstarvi við Kunningarstovuna í Fuglafirði, sum heldur til í somu húsum sum bókasavnið.

**Førleikakrøv:**
Til starvið krevst útbúgving sum bókavørður, men um so verður, at eingin umsøkjari er til starvið við hesi útbúgving, so kann annar umsøkjari verða settur í 1 ára tíðaravmarkað starv. Tú skal hava viðkomandi førleika í enskum máli í talu og skrift, somuleiðis sum tú skal duga væl at orða teg bæði munnliga og skrivliga, hava teldukunnleika og kunnleika til nýmótans leiðsluamboð.

**Vit bjóða tær:**
Eitt spennandi og sjálvstøðugt starv, har tú fært møguleika fyri at menna bókasavnið.

**Setanartreytir:**
Starvið er fulltíðarstarv og verður lønt sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Hevur tú áhuga**
so ert tú vælkomin at senda skrivliga umsókn saman við prógvum og møguligum CV og viðmælum til Fuglafjarðar býráð, Ennivegur 38, 530 Fuglafjørður, og skal henda verða ráðnum í hendi í seinasta lagi týsdaginn tann 08. februar 2011 kl. 16.00.

**Nærri upplýsningar**
fáast við at venda sær til Jákup Frants Larsen, býráðsskrivara á telefon 737700.

Býráðið skilar sær rætt til at velja millum innkomnar umsóknir ella onga at taka.

*Fuglafjørður, tann 20. januar 2011*

**Fuglafjarðar býráð**



# Hús til leigu/sølu

Felagshús okkara í Sjúrðargøtu 20 er til leigu/sølu. Ognin sum liggur í Sjúrðargøtu, er vælegna til skrivstovu/r. Til ognina er parkeringspláss til 6 bilar.

Nógv er gjørt við ognina, so sum renovering av fasaduni, útskiftan av rútum, útgraving og drening av kjallara, so ognin í dag er í góðum standi.

Atlanin er at leiga ognina út, men kemur eitt nøgtandi boð, er eisini áhugi fyri at selja.

Áhugaði kunna venda sær til skrivstovu felagsins, á telefon 354800 ella fartelefon 234802 fyri at fáa meir at vita.

Sosialurin 341800

**Havnar Handverkarafelag**
Stoffalág 60, 110 Tórshavn, handverk@handverk.fo

SANDAVÁGS TIMBURHANDIL
Hillingatangi - 360 Sandavágur - Tlf. 332700 - www.timbur.fo

## Goymsfólk til Sandavágs Timburhandil

Sandavágs Timburhandil søkir eftir ágrýtnum og nærlagdnum goymslufólki at byrja beinanveg.

**Starvið** verður fyribils sett árið út, men góður møguleika verður halda framm.

Sandavágs Timburhandil veitir alt byggitilfar um alt landið, og starvið fevnir bæði um koyring av vøru til viðskiftafólk okkara og røkt av goymslu okkara.

**Umsøkjarar** við lastbil-, trukk og/ella kranakoyrikorti hava fyrimun.

**Umsóknir** skulu sendast til jarnhold@timbur.fo.

**Nærri fæst at vita** um starvið við venda sær til Jarnhold Nattestad á tel. 532701.

**Suðuroyar Sjúkrahús**
FO-800 Tvøroyri
Tlf: 34 33 00 · Fax: 37 11 42
E-mail: ssh@ssh.fo

# Fysioterapeutur

Vegna farloyvi verður søkt eftir fysioterapeuti í tíðarskeiðnum frá 1. mars til 15. desembur 2011.

**Arbeiðsøkið hjá fysioterapiini er:**
- Viðgerð av innløgdum sjúklingum, og eftirviðgerð aftaná innlegging, eisini frá hinum sjúkrahúsunum í landinum.
- Viðgerð av búfólki á ellis- og røktarheiminum á Tvøroyri.
- Ambulant virksemi.

**Løn – og setanartreytir:**
Starvið verður sett sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálaráðið og Fysioterapeutfelag Føroya.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Sáru Olsen, leiðandi fysioterapeut.

**Umsókn:**
Umsókn við avriti av prógvi, góðkenning v.m.
*skal sendast til:*
Suðuroyar Sjúkrahús
att. sjúkrahússtjórin
Sjúkrahúsbrekkan 19
800 Tvøroyri
ella ssh@ssh.fo

*Umsóknarfreist: 14. februar 2011*

fk **Matseðil**

Í dag 24. januar 2011
**Fiskafrikadellur og Bollar í karry v/ rísi**

*Til ber at keypa døgurða við heim*

**Matstovan í Hoyvík**



Altíð tað nýggjasta

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo